## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin minkar hann vindin niður í lot av vestri, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og útsynningi og regn. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk millum sunnan og vestan, um kvøldið lot av ymsum ættum. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, men sunnudagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Bárður Dal Christiansen sýnir fram í Snarskivuni

**»Orka« eitur framsýningin um ta ráu og alternativu orkuna, sigur Bárður Dal Christansen, sum er 24 ára gamal havnarmaður**

UMHVØRVI OG LIST



*24 ára gamli Bárður Dal Christiansen úr Havn sýnir fram í Snarskivuni hjá Tórshavnar Kommunu sum partur av Umhvørvisvikuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri fyrstu ferð hevur Umhvørvisvikan hjá Tórshavnar Kommunu eina listaframsýning, sum part av vikuni. Fyrsta listarfólki at sýna fram, er 24 ára gamli Báður Dal Christiansen úr Havn, sum altíð hevur havt áhuga fyri tí kreativa.

Framsýningin, sum er ein partur av umhvørvisvikuni hjá Tórshavnar Kommunu, hevur fingið heitið »Orka«, og hon fevnir um málningar og tekningar.

Tað var Elin Lindenskov, forkvinna í umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu, sum lat framsýningina upp – og hon var fegin um, at tað júst varð Bárður, sum var hin fyrsti at sýna fram:

- At tað bleiv tú, sum skuldi gerast fyrsta listarfólkið í eini umhvørvisviku, eri eg – sum gumma tín – errin av, segði hon og legði afturat hendan avgerðin tó ikki var hennara. – Men tá visti eg, at vit fóru at fáa eina spennandi framsýning, segði hon.

Talan er um eina litríka framsýning og um nýggjar hættir at nýta og finna orku. Ein street framsýning um, hvussu vit kunnu skapa ein reinari heim, sigur Bárður Dal Christian, sum í løtuni arbeiðir í donskum barnagarði, og sum samstundis er helvtin av listabólkinum Scrub.Art í Havn. Hin helvtin er Ólavur Thorsteinsson.

- Eg havi altíð verið nógv inspireraður av street art, hiphop mentan og grafiskari list, sigur Bárður við torshavn.fo og ger vart við, at honum dámar væl at mála evni, ella myndir, bara tí tey eru stuttlig at arbeiða við.

- Tí er tað, at tað onkuntíð kann verða eitt sindur barnsligt, sigur Bárður lítillátin.

Bárður er millum yngstu limir í felagnum Føroysk Myndlistafólk. Hann hevur sýnt fram á Várframsýningini 2006 og 2007, Slóarblóð 2007, í Eik Banka 'Random Stuff' 2007 og á Summarframsýningini 'Kanska' í 2008.

Sum partur av Scrub. Art hevur Bárður prýtt Margarinfabrikkina í 2007, sýnt fram á G-Festivalinum í 2007 og 2008, prýtt Cippo í 2007, verið við í stuðulstiltaki fyri Amnesty Føroya Deild í 2009, gjørt pallprýði til The Wall konsert í Norðurlandahúsinum fyrr í ár og live show og stuðulstiltak fyri Ung.fo í SMS í ár.

Framsýningin verður opin fram til 2. juni kl 16.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 10 |
| Madrid | -- |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 34 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 981 hPa. norðan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/04 kl. 06[00] – 29/04 06[00]. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 28/04 kl. 06[00] – 29/04 06[00].
Avfallið higartil í apríl: 106 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

28.apríl — Mánin næstur jørðini
1.mai — Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. mai | 04:27 | 16:49 | 03:27 | 15:49 | 03:42 | 16:04 | 06:27 | 18:49 | 07:27 | 19:49 | 02:42 | 15:04 | 01:42 | 14:04 | 04:42 | 17:04 | 05:42 | 18:04 | 04:12 | 16:34 | 05:27 | 17:49 |
| 6. mai | 05:11 | 17:32 | 04:11 | 16:32 | 04:26 | 16:47 | 07:11 | 19:32 | 08:11 | 20:32 | 03:26 | 15:47 | 02:26 | 14:47 | 05:26 | 17:47 | 06:26 | 18:47 | 04:56 | 17:17 | 06:11 | 18:32 |
| 7. mai | 05:54 | 18:15 | 04:54 | 17:15 | 05:09 | 17:30 | 07:54 | 20:15 | 08:54 | 21:15 | 04:09 | 16:30 | 03:09 | 15:30 | 06:09 | 18:30 | 07:09 | 19:30 | 05:39 | 18:00 | 06:54 | 19:15 |
| 8. mai | 06:37 | 19:00 | 05:37 | 18:00 | 05:52 | 18:15 | 08:37 | 21:00 | 09:37 | 22:00 | 04:52 | 17:15 | 03:52 | 16:15 | 06:52 | 19:15 | 07:52 | 20:15 | 06:22 | 18:45 | 07:37 | 20:00 |
| 9. mai | 07:24 | 19:48 | 06:24 | 18:48 | 06:39 | 19:03 | 09:24 | 21:48 | 10:24 | 22:48 | 05:39 | 18:03 | 04:39 | 17:03 | 07:39 | 20:03 | 08:39 | 21:03 | 07:09 | 19:33 | 08:24 | 20:48 |

Kelda. Álmanakkin 2008